


**Nr. 25** ***8. desembur 2024*** **84. árg.**

# Vita tey, at jól eru?
## Hvør tók jólagávuna frá teimum?

„Tað fólkið, sum gongur í myrkri, skal síggja stórt ljós, og ljós skal lýsa yvir teimum, sum sita í deyðaskuggans landi.“ Jes. 9,2.

Nú gongur tað við ferð móti tí mest strevnu tíðini hjá okkum her í Vesturheiminum. Við jólagávum og allari strongd og øllum stríði, sum verður gjørt fyri at fáa hjólini og jólini at gerast so góð sum gjørligt hjá okkum øllum. Í hesum døgum er tað meir enn nakrantíð týdningarmikið at hugsa um okkara næsta, tey fátæku og glataðu.

Verðin er órættvísari enn nakrantíð áður, og vit kristnu hava eisini ábyrgdina av tí. Størsta órættvísið er, at menniskju í milliónatali glatast uttan at hava hoyrt um Gávuna, sum jólini góvu okkum, nevniliga Jesus Kristus.

Vit eru øll skapt til felagsskap við Gud, annaðhvørt vit búgva í Norðurlondum ella við heimsins enda. Tað var øll ætlanin við skapanini. Orsøkin til, at Gud skapaði himmalin og jørðina, vóru tú og eg. Vit vóru tey hepnu. Øll menniskju vórðu skapað í Guds mynd, so tey skuldu liva í samfelagi við hann. Hetta er innihaldið í jólunum.

Einglarnir á Betlehems fløtum søgdu við hirðarnar: „Sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði!“

Øll mugu sleppa at hoyra, at Frelsarin er føddur. Tá ið Jesus hevði bøtt fyri allar heimsins syndir, setti hann seg við Faðirsins høgru síðu. Har skal hann sita, til hann kemur at taka brúðrina

heim. Henda brúðurin eru tey, sum Gud hevur skapt av øllum ættargreinum og tungumálum og tjóðum og fólkasløgum út um alla jørðina (Opb. 5,9). Tað síðsta, Jesus segði, áðrenn hann fór aftur til himmals, var eisini tað týdningarmesta, hann hevði at siga sínum her á jørð: „Farið út og boðið evangeliið um frelsu til allan heimin!"

Gamli Símeon, sum tók Jesusbarnið í armar sínar, hevði skilt hetta. Hann segði: „Tí at eygu míni hava sæð frelsu tína, sum tú hevur búgvið til fyri øll fólkasløg, eitt ljós til at lýsa fyri heidnum monnum og eina dýrd fyri Ísrael, fólk títt." Luk. 2,30–32. Kæri lesari, vit hava fingið litið upp í hendur at fara út við Jólanna Gávu til øll, sum liva á okkara felags jørð. Jesus hevur sent okkum. Hann kann ikki longur fara út í mannalíki at boða gleðiboðini fyri øllum. Men hann sendi okkum Heilaga Andan, so hann kundi vera við okkum, tá ið vit gera tað.

Hvør tók jólagávuna? Jú, Satan tók gávuna frá milliónum, sum nú liva í myrkri. Bíblian kallar hann tjóvin, og Jesus segði: „Tjóvurin kemur ikki til annað enn at stjala og drepa og oyða; eg eri komin til tess, at teir skulu hava lív og hava yvirflóð." Jóh. 10,10.

Lygnir, sjálvgóðska, verðsligheit og villleiðing hava bundið Guds børn gjøgnum nógv ættarlið, so at tey ikki fóru út við Jólanna Gávu til øll fólkasløg. Men nú liva vit í endatíðini, so nú má ferðin fleirfaldast og rættilig gongd koma á.

*Rune Edvardsen – Effie Campbell* umsetti.

# Fjósið og hjartað

*Randi Filtved Johansen*

Maria varð vald at bera Jesus í heim. Mundi tað vera, av tí at hon var so fitt og ófør? Eg ivist onga løtu í, at hon hevur livað eitt reint lív; men Bíblian sigur, hví Gud valdi Mariu. Í Luk. 1. kap. vers 28 sigur eingilin við Mariu: „Heil veri tú, sum náði hevur fingið." Og longri niðri í 30. versi sigur hann: „Tí at tú hevur funnið náði hjá Gudi."

Tað var alt av náði, og tað er tað eisini hjá okkum. Vit eru frelst av náði, við trúgv, tað er ikki okkum at takka, tað er Guds gáva. (Ef. 2,8). Tá ið vit samanbera okkum við onnur, so hava vit lyndi at halda okkum vera so rættvís. Men tað er hugmóð, og tað er ein synd. Hin gamla slangan er hál og snúin, fær hon

okkum ikki niður við nakkanum, so blæsur hon okkum upp, so vit halda, at vit eru nakað.

Fjósið í Betlehem og mannahjørtuni hava nógv í felag. Maria og Jósef gingu hús úr húsi og bankaðu uppá; men ongastaðni var rúm fyri teimum. Soleiðis er tað við Jesusi eisini í dag. Hann er ein heiðursmaður, hann trokar seg ikki inn á nakran, men stendur uttanfyri og bankar uppá: „Sí, eg standi við dyrnar og banki uppá. Um einhvør hoyrir rødd mína og letur upp dyrnar, tá skal eg fara inn til hansara og eta náttturða saman við honum og hann við mær.“ Opb. 3,20. Nógvastaðni er einki hjartarúm fyri Jesusi, tíverri.

Tá ið Maria og Jósef komu til fjósið, fór hurðin upp á glopp. Har var rúm. Hvat var tað fyrsta, tey sóu? Ein oksa og ein asna! Oksin er mynd upp á styrki. Man ikki mangur ein oksi hava verið í okkara hjarta? Vit halda, at vit megna alt sjálv. Vit eru so sterk og ófør. Tað eru bara tey ússaligu og gomlu, sum hava brúk fyri Jesusi og hansara hjálp.

Ein asni var eisini har. Hann er ein mynd upp á treiskni, treiskur sum ein asni. Nú, tá ið so nógv ár eru farin, fái eg hug at siga frá einum, sum eg upplivdi, tá ið eg arbeiddi á Ullevål sjúkrahúsi í Oslo. Brádliga talaði Heilagi Andin við meg og segði, at eg skuldi fara inn á ta og ta stovuna. „Men góðasti Jesus, eg havi ikki loyvi at fara har.“ Tað var ein intensiv hjartadeild. Sjúklingarnir lógu við slangum og tólum og høvdu fingið skurðviðgerð. „Tú skalt einki siga, men bara standa har,“ svaraði Jesus.

Eg fór so og stillaði meg við fótalagið á tí songini, sum eg hevði fingið boð um. Eg smíltist bara og talaði ikki eitt orð. Alt í einum merkti eg sterku nærveru Heilaga Andans, og maðurin bankaði við nevanum inn á hjartað og rópti: „Eg havi fingið eitt nýtt hjarta. Far í ovastu skuffu eftir testamentinum. Eg skal ikki brúka tað longur.“ Eg hugsaði við mær, nú fái eg trupulleikar, tí tað gjørdist sovorðin levint og gangur inni á stovuni. Men maðurin rópti: „Kona mín er trúgvandi, og eg dugi næstan Bíbliuna uttanat, tí hon hevur fóðrað meg við skriftstøðum; men eg havi verið treiskur sum ein asni og havi einki viljað havt við tílíkt at gjørt. Hevði tú sagt eitt skriftstað við meg í áðni, so hevði eg ikki vent um. Far tú og ring til konu mína og sig henni, at eg eri frelstur.“

Eg vildi ikki tosa inni á skrivstovuni, so eg fann mær nakrar krónur og brúkti mynttelefonina úti á gongini. „Góðan dagin, hetta er á Ullevål sjúkrahúsi. Maður tín bað meg ringja og siga, at hann er frelstur," segði eg, tá ið ein kona tók hornið.

„Tú hevur fingið skeivt telefonnummar," svaraði konan og legði á. Eg ringdi uppaftur og endurtók tað, eg hevði sagt. „Nei, tað er ið hvussu er ikki maður mín," svaraði røddin og legði á. Fyri triðju ferð ringdi eg uppaftur og segði navnið á honum. Tá brast hon útúr at gráta av gleði.

Hvat meir var inni í fjósinum? Hoyggj og hálmur. Ein dagin sá eg ein bil koma koyrandi við einum tilhangara fullum av hoyggi og hálmi. Á tilhangaranum stóð henda løgna áskriftin: „Hoyggj og hálmur finnur altíð ein tilhangara." Tað, sum henda verð hevur at bjóða, er tað bera hoyggj og strá, og fólk tyrpast har. Men soleiðis má ikki vera hjá okkum, tí Skriftin sigur, at um vit byggja við hoyggi og hálmi, tá skal verkið hjá okkum brenna upp. (1. Kor. 2,12–15).

Hvat annað var inni í fjósinum? Mykjuroykur! Men vísmenninir komu á vitjan, og teir høvdu roykilsi og myrru við sær, so hasin lukturin hvarv. Hvussu er tað við okkum, loyva vit vísmonnunum at koma inn í hjarta okkara. Bíblian sigur: „Harrans ótti er upphav at vísdómi." Sálmur 111,10.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit eru send út í heimin, sum Jesus varð tað (Jóh. 20,21). Tað er heilt ótrúligt, hetta arbeiðið, vit skulu gera. Hann, sum skapaði heimin, hevur litið okkum til at bera hini størstu og gleðiligastu tíðindini, sum nakrantíð hava ljóðað. Á tann æra og tað álit, at vit eru send til heimin sum umboðsmenn hansara.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 8. des. | **Tekstur:** *Advent:* Jes. 7,14 + 9,6 | **Bíbliuorð:** Jes. 9,6a |
| 15. des. | **Tekstur:** Luk. 1,26–38 | **Bíbliuorð:** Luk. 1,28 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




Nr. 26 *22. desembur 2024* 84. árg.

# Knútur fann aftur til faðirs og móður Gud

Knútur var yngstur av seks systkjum. Hann var tað, vit kalla ein seinføðingur (eftirnølari). Tað vóru heili sjey ár millum hann og tann næstyngsta í systkinaflokkinum. Faðir og móðir vóru bæði farin upp um tey 40, tá ið Knútur varð borin í heim.

Foreldrini vóru ikki múgvandi, men heldur ikki fátæk. Tað gekst teimum væl á tí miðalstóra garðinum mitt inni í Valdres. Tey vildu so fegin geva børnum sínum kunnleika. Tí sluppu øll børnini í realskúla. Harumframt vóru foreldrini játtandi kristin og virkin bæði í kirkju og missiónshúsi í bygdini. Av tí at missiónin lá teimum á hjarta, mundi tað vera missiónshúsið, sum stóð teimum næst. Fleiri av systkjum Knúts høvdu eisini tikið eina greiða kristna støðu. Tá ið Knútur kom í tann týdningarmikla broytingaraldurin eftir konfirmatiónina, gjørdi hann uppreistur móti tí, foreldrini og systkini trúðu á. Hann vildi ikki fara í missiónshúsið við teimum og gekk sínar egnu leiðir. Tá ið Knútur var liðugur við realskúlan og hevði hjálpt til á garðinum eina tíð, søkti hann og slapp inn á Verkfrøðingaskúlan í Gjøvik.

Tá ið skúlagongdin var liðug – og Knútur hevði sanniliga fingið góð pappír – fekk hann starv í einum trævøruvirki í grannabygdini. Her gekst óføra væl hjá Knúti. Tað gingu ikki mong ár, fyrr enn hann sat sum stjóri og átti alt virkið. Hann kom eisini í bygdarráðið. Alt gekk so avbera væl hjá honum. Men tíverri kristinlívi og missiónshúsi vísti hann ongan ans.

Árini gingu. Tá ið foreldrini doyðu við stuttum millumbili í 75-ára aldri, vóru tað helst mangar hugsanir, sum rørdust í Knúti. Elsti bróðirin, sum nú rak garðin, var ein hjartagóður

og trúgvandi maður. Í minningargudstænastuni eftir bæði foreldrini tosaði bróðirin við frímóði um tann ríka kristna arvin, sum faðir og móðir høvdu latið eftir seg. Hann hevði eisini nevnt, hvussu neyðugt tað var at venda um og eiga eina persónliga trúgv á Jesus Kristus. Hetta mundi helst stinga Knút í hjartað. Men hann skúgvaði tað frá sær. Hann hevði jú úr at gera. Nøkur ár seinni var Knútur eini ørindi í høvuðsstaðnum. Sum politikkari skuldi hann á fund í einari av stjónardeildunum. Hetta var í desember mánaði, og tað sást í høvuðsstaðnum, at jólini nærkaðust. Hann kom til Oslo út á seinnapartin. Eftir at hann hevði skrivað seg inn á hotellið, har hann skuldi gista, fór hann at spáka sær ein túr oman eftir Karl Johan. Á Universitetsplassen stóð hitt stóra jólatræið tendrað, og Frelsunarherurin stóð og sang „Nú ringja klokkur jólafest". Tað ljóðaði so vakurt. Hesin jólasálmurin hevði nógv at týða hjá Knúti. Tað var hann, tey altíð plagdu at syngja heima hvørt jólakvøld, eftir at pápin hevði lisið jólaevangeliið.

Tankarnir um barndómsheimið og faðir og móður gjørdust so sterkir, har hann stóð og lurtaði. So setti Frelsunarherurin í „Jesus-navnið aldri bliknar". Hetta hevði verið sangurin hjá faðir og móður fram um allar aðrar. Nú gjørdist ovboðið hjá Knúti. Hann kendi tað, sum hjartað fór at bresta. Hann kvikaði sær aftur til hotellkamarið. Hann seig niður í ein stól og græt hart. Brádliga stóð alt so greitt fyri honum: Hann hevði vrakað faðirs og móður Gud, og nú var hann á veg móti glatan. Men hann kendi eisini kallið frá Gudi til umvending og til at byrja eitt nýtt lív. Fyri fyrstu ferð í mong ár bað Knútur til Guds. Og nú var tað ikki bara ein bøn um hjálp at taka ta røttu avgerðina í einari torførari støðu. Nei, nú var tað ein angrandi syndari, sum viðgekk skuld sína fyri einum heilagum Gudi. Ein slík bøn verður altíð hoyrd. Hann visti, at tað var ein Bíblia á hotellkamarinum. Hann las leiðbeiningina fremst: „Hvussu fært tú vissu fyri, at Gud hevur fyrigivið tær allar syndir tínar." Tað var gott at lesa 1. Jóhs. 1,7–9: „Men um vit ganga í ljósinum, eins og hann er sjálvur í ljósinum, tá hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd. Um vit siga, at vit ikki hava synd, tá svíkja vit okkum sjálv, og sannleikin er ikki í okkum. Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi." – og onnur skriftstøð við. Knútur fekk frið við Gud hetta kvøldið.

Hann visti, at Templið hjá Frelsunarherinum lá tætt við, í Pilestredet. Har legði hann leiðina. Tá ið innbjóðingin ljóðaði at koma fram til bótarbonkin, var Knútur hin fyrsti, sum fór fram. Har bað hann saman við kristnum vegleiðarum. Hjarta hansara fyltist við frelsuvissu so við og við.

Eftir at hann hevði røkt síni ørindi í stjónardeildini, byrjaði hann heimferðina. Men nú steðgaði hann ikki, fyrr enn hann var aftur í barndómsheiminum. „Eg havi givið meg yvir til Guds," segði hann við beiggja sín. So fevndust teir og grótu gleðitár hetta kalda desemberkvøldið í túninum á Moen garði. Seinni sótu teir til langt út á kvøldið og prátaðu um Guds undurfullu leiðslu. „Hetta skuldu pápi og mamma havt upplivað," segði bróðir Knúts. Knútur gisti har um náttina. Dagin eftir fór hann út í kirkjugarðin. Á leiðinum hjá faðir og móður stóð hann leingi og græt stillisliga. „Vit hittast í himli", stóð skrivað á steininum. „Ja, har skulu vit syngja saman „Nú ringja klokkur jólafest" og „Jesus-navnið aldri bliknar"," teskaði Knútur gjøgnum tárini.

Tey jólini upplivdi Knútur ein frið, hann ongantíð fyrr hevði kent. Tað var hjartafriðurin, sum øll fáa, sum venda um og taka ímóti sjálvum **Friðarhøvdinganum**. Knútur hevði funnið leiðina aftur til faðirs og móður Gud.

*„Himmelveien"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Ein jólasøga um eitt geyka-ur

**Ein diakonissa og sjúkrasystir, sum arbeiðir á røktarheiminum í Betaniahúsinum tætt við Solingen, upplivdi einaferð nakað serstakt:**

Hon hugsaði nógv um øll tey, sum liðu neyð í hesum heimi, og tí hevði hon í nógvar vikur undan jólum pakkað 24 pakkar. Alt stríðið at keypa, pakka og senda hevði gjørt hana útlúgvaða; men kortini hevði tað fylt hana við nøgdsemi og gleði.

Men enn var ein pakki, sum skuldi avstað. Hann skuldi til Póllands. Hon hevði akkurát nóg mikið av pengum til hansara. Hon kom at hyggja upp á tann tóma veggin, og tá kom hon at minnast eitt ynski, sum hon leingi hevði havt, at keypa eitt geyka-ur. Tá ið samanum kom, mátti hon eisini vera eitt sindur góð við seg sjálva! Hevði Bíblian ikki eina áminning til tey kristnu at elska onnur sum sjálvan seg? Fýra og tjúgu pakkar var prógvið um kærleika hennara til teirra, sum vóru næsti hennara, vinir hennara og næstrafólk! Nú mundi tað vera í lagi eisini at vera eitt sindur góð við seg sjálva! Sum jólini nærkaðust,

fekk hon ikki frið í sinnið. Fleiri ferðir hevði hon ætlað sær at farið at hugt at geyka-urinum; men hvørja ferð hevði hon lagt pengarnar aftur í pungin.

„Kanska tørvar hasum fólkunum í Póllandi ikki longur hjálp mína,“ royndi hon at siga við seg sjálva. Men so gjørdist tað brádliga greitt fyri henni, at tankarnir bert vóru ein roynd at steðga góðu ætlanum hennara, og hon fór og keypti fyri síðstu pengar sínar sovorðið, sum ikki fekst í Póllandi, og skjótt var pakkin liðugur og sendur avstað.

Glað fór hon heim aftur at hvíla seg eftir ein langan túr oman á posthúsið. Alt í einum ringdi onkur upp á dyrnar. Eitt sindur ivandi læt hon upp, og har stóð postmaðurin við einum pakka til hennara. Hon dugdi als ikki at hugsa sær, hvør ið hevði sent hann. Eftir at hava kýtt seg, eydnaðist tað henni at stava seg ígjøgnum navnið á sendaranum. Og so mintist hon. Hetta vóru nøkur fólk í Schwarzwald, sum hon hevði hitt nakað síðani, og seinni hevði hon givið teimum kristiligan lesnað.

Tá ið hon hevði tikið tað brúna pappírið av og latið eskjuna upp, kundi hon rópt hart av gleði. Í eskjuni lá eitt geyka-ur, eitt rættiligt geyka-ur úr Schwarzwald!

Fólkini í Schwarzwald vildu fegin vísa sítt takksemi fyri tann kristiliga lesnaðin, sum diakonissan hevði givið teimum. Ella var tað Gud sjálvur, sum brúkti familjuna í Schwarzwald at pynta veggin og at lýsa upp í lívinum hjá hesari trúgvandi diakonissuni? Kalla tað, hvat tú vilt; men henda týska diakonissan er sjálv sannførd um, at Gud ikki bert lurtar eftir teimum tigandi ynskjunum, vit hava í hjørtum okkara; men at hann eisini talar til okkara, sjálvt gjøgnum eitt geykalát. Tí hvørja ferð geykurin letur tímasløgini, minnir hann hana um, hvussu sigur á sjálvgóðsku og tí at vera ringur eftir verðini kann føra til størstu gleði.

*„Kirkeklokken“ – Effie Campbell* umsetti.

**Sunnudagsblaðið**

**ynskir øllum eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári**

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22. des. | **Tekstur:** *Jólanátt – Jesu føðing:* Luk. 2,1–20 | **Bíbliuorð:** Luk. 2,10–11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74